ÍF-B36 1-0 (0-0):

# ÍF heldur tørn

**Fuglfirðingar reistu seg aftur eftir eyðmýkjandi tapið ímóti B68 seinasta vikuskiftið, tá tað eydnaðist at vinna ein tepran sigur á B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Roy Róin var aftur at síggja á ÍF-liðnum leygardagin, tá tað eydnaðist at vinna ein tepran sigur á B36. ÍF er nú fýra stig frammanfyri TB á øðrum plássi.*

*Savnsmynd*

Oddaliðið ÍF fekk leygardagin sín fyrsta sigur eftir summarsteðgin, tá B36 varð sent heimaftur við einum 1–0 tapi.

ÍF helt sostatt fast við oddasessin í 2. deild um vikuskiftið, og tá Sumba tapti í Klaksvík øktist munurin niður til næstfremsta liðið, sum nú er TB, fýra stig.

Fuglfirðingar hava vunnið allar sínar heimadystir í hesum kappingarárinum, og hendan góða vanan hildu fuglfirðingar aftur fast við.

### Fáir málmøguleikar

ÍF hevur sambært hagtølunum bestu verjuna í 2. deild, men tað eru hinvegin fleiri lið, ið hava skotið nógv fleiri mál enn ÍF.

Fyri steðgin hevði ÍF takið á dystinum og legði trýst á B36-verjuna. Hóast leikliga yvirvág eydnaðist tað ongantíð at spæla seg fram til ein opnan málmøguleika í fyrra umfari.

Hvørja ferð ÍF nærkaðist B36 brotsteiginum vantaði altíð tann síðsta og avgerandi avleveringin.

B36 hevði hinvegin torført við at flyta spælið niðan á hálvuna hjá mótstøðuliðnum, og B36-ararnir fullu ferð eftir ferð í ta vælvirkandi ragnstøðufelluna hjá ÍF.

### Lívligari eftir steðgin

Hevði fyrri hálvleikur verið heldur fátækur fyri málmøguleikar, kom meira ferð á í seinna hálvleiki, og bæði liðini skaptu fleiri møguleikar. ÍF hevði framvegis munin leikliga, men B36 svaraði nú aftur.

ÍF hevði tveir serliga stórar málmøguleikar eftir steðgin, og var tað Hanus Eliasen, sum var tann stóri syndarin í hesum sambandi. Tveir ferðir kom hann at standa rættiliga leysur í brotsteiginum, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin í netið. Fyrru ferðina bjargaði málverjin Magnus Poulsen, og seinnu ferðina fór bólturin dygst framvið stongini.

B36 hevði eisini ein gyltan møguleika, áðrenn ÍF legði seg framum. Hetta hendi, eftir at málverjin hjá ÍF spældi bóltin beint fyri føturnar á Áka Mørk í álopinum. Áki fór framvið málverjanum, men fór síðani um koll. Dómarin lat ikki við seg koma, hóast B36-ararnir mótmæltu harðliga, at einki brotsspark varð dømt.

### Útskifting avgerandi

Móti endanum av dystinum gjørdi venjarin hjá ÍF eina serstakliga hepna útskifting. Hann setti Rúna Petersen inn í álopið, og Rúni skeyt eisini sigursmálið.

Hetta kom eftir innkast í vinstru síðu. Bólturin varð tveittur til Rúna, sum vendi sær og gúppaði bóltin innfyri. Hóast tað helst ikki var ætlanin, so fór bólturin uppum málverjan og í netið til endaliga úrslitið 1-0. Málið kom tá tíggju minuttir vóru eftir at spæla.

Í seinastu løtu fekk B36 ein góðan møguleika at javna, men Tórálvur Poulsen skeyt framvið málinum, tá hann var púra leysur við málverjanum.

Annars kann nevnast, at hetta var fyrsti landskappingardysturin á nýggja undirlagnum í Fuglafirði, sum er eins teir nýggjastu vallirnir í Føroyum.

**ÍF-B36 1-0 (0-0)**
1-0: Rúni Petersen

# Erling var høvuðsleikari

2. DEILD KÍ–SUMBA
*Jóannes Hansen*

Tann spælarin, sum mest var í miðdeplinum, tá ið KÍ og Sumba spældu í Klaksvík leygardagin, var KÍ álopsspælarin Erling Fles. Hann skoraði trý av teimum fýra málunum í 4–1 heimasigrinum, og tríggjar minuttir undan leikloki vísti dómarin honum reyða kortið. Eftir at Erling hevði mist í gjøgnumbroti elti hann mótstøðumannin, sum fór um koll. Álopið helt fram, og tá ið bólturin var farin út av vøllinum veittraði linjuverjin dómaran til sín, og so varð dømt fyri hevnisøku. Tað vóru teir á heimaliðnum alt annað enn nøgdir við.

Í fótbóltsspælinum var lítil ivi. KÍ, ið hevði átta spælarar á liðnum, sum fríggjakvøldið umvegis Egilstaðir í Íslandi vóru komnir úr Molde, var greitt omaná. Erling Fles setti hol á í 7. minutti, eftir at David Bertholdsen hevði lagt flatt innfyri úr høgru. Aftasti verjuskansin hjá KÍ, Niclas Niclassen, økti í 22. minutti til 2–0 við frísparki úr 58!! metrum í vinstru. Ætlanin var ivaleyst at senda inn fyri málið, har Olgar Danielsen og Marlin í sumbiarmálinum fóru upp, og bólturin sigldi omanfyri báðar og í málið.

Fýra minuttir seinni minkaði Karl Lisberg um munin. Eftir skjótt tikið frí-spark í vinstru legði René Thomsen væl innfyri, og Karl Lisberg stútaði. Eitt fínt mál. Í 57. minutti var Erling aftur upp á spæl. Enn eina ferð var tað David Bertholdsen, sum átti næstsíðsta fótin, eftir at hann hevði rikið til málteigin í høgru og síðani lagt útfrá til leysa álopsmannin við fremra stólpa.

Á tímanum varð heimasigurin sligin rimmar fastur. Leon Bjartalíð stakk fram ímillum, og Erling setti framvið málverjanum.

Í 24. minutti misti Sumba Hans Jákup Thomsen, sum noyddist út – Jan Poulsen kom inn fyri hann. Robert Cieslewicz var ikki førur fyri at spæla frá fyrsta bríksli. Hann kom á vøllin eftir steðgin, tá ið Eirikur Joensen fór út, men tað hjálpti ikki. David Bertholdsen, Símun Joensen og Leon Bjartalíð áttu miðvøllin, og tað var týðuligt, at tað var stórur munur á spælarum, sum venja og ofta spæla í fremstu røð og so teimum í næstbestu deildini.

**2. deild**
**KÍ–Sumba 4–1 (2–1)**
1–0: Erling Fles 7.
2–0: Niclas Niclassen 22.
2–1: Karl Lisberg 26.
3–1: Erling Fles 57.
4–1: Erling Fles 60.
**Reytt kort:** Erling Fles 87.

VB-B68 6-0 (0-0):

# Toftamenn mistu luftina

**Hóast tað stóð á jøvnum í steðginum, so vann VB við seks málum móti ongum, tá botnliðið B68 var á vitjan**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

VB hevur staðið seg sera væl í landskappingini í 2. deild í ár, og um vikuskiftið vunnu vágbingar stórsigur á toftamonnum, sum enn liggja aftast.

Fyrri hálvleikur var annars sera javnur, og bæði liðini skaptu sær fleiri málmøguleikar. Tað var annars heldur løgið, at einki mál kom fyri steðgin, tí at málmøguleikarnir vóru avgjørt til tess.

VB sendi nógv fólk fram á vøllin, og hetta gav eisini B68 møguleika fyri nøkrum skjótálopum.

### VB fær hol á

Tá bert fimm minuttir vórðu leiktir í seinna umfari, fekk VB hol á. Tað var Bergur Vinther, sum skeyt tað málið.

Eftir hetta málið fór luftin úr ballónini hjá B68, og leikararnir fullu í fátt. Hóast tað hevði gingið væl inntil hetta fyrsta málið, góvu toftamenn at kalla skarvin yvir.

VB var als ikki til at steðga eftir steðgin, og málini skolaðu inn í B68 málið. Janus Kjærbo økti til 2-0 og Bergur Vinther fekk sítt næsta mál, tá hann skoraði til 3-0.

Kári í Lágabø skoraði til 4-0, og tann innskifti Sigmund Mikkelsen skoraði til 5-0 og 6-0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Við hesum sigrinum heldur VB tørn í oddinum og er framvegis við í stríðnum um heiðursmerkini. Næstu ferð skulu teir til Havnar at spæla ímóti B36.

B68 hevur framvegis ein møguleika at lívbjarga sær í 2. deild. Fýra stig eru nú upp til B71. Fyrri hálvleikur í Vági ber boð um, at toftamenn kanska hava okkurt at bjóða uppá í seinnu helvt av landskappingini.

Næstu ferð tekur B68 ímóti KÍ, sum er væl koyrandi í løtuni.

**VB-B68 6-0 (0-0):**
1-0: Bergur Vinther
2-0: Janus Kjærbo
3-0: Bergur Vinther
4-0: Kári í Lágabø
5-0: Sigmund Mikkelsen
6-0: Sigmund Mikkelsen



B71 – AB 1-1 (0-0):

# AB misti á stokkinum

**B71 vórðu kroystir undan dystinum móti AB, sum nú hevur mist allar vónir um at flyta upp. Sandoyingar fingu útjavnandi málið í evstu løtu**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Tað vóru tvey lið í kreppu, sum møttust á Sandi leygardagin. B71 berjist fyri at sleppa undan niðurflyting, og tað eina stigið var kærkomið hjá heimaliðnum, hóast teir ætlaðu sær øll trý stigini.

AB varð undan kappingarárinum mett sum ein outsidari í uppflytingarstríðnum, men nú eru allar vónir brostnar um 1. deildarfótbólt á Argjum komandi ár.

Argjamenn hava ikki vunnið í seks teimum seinastu umførunum í landskappingini. Ikki síðan AB vann á B68 á heimavølli í fimta umfari, hevur tað eydnast at fáa ein sigur til høldar.

AB hevur heldur ongantíð vunnið á útivølli, og hóast tað var um reppið hesuferð, so vóru marginalarnir ikki við argjamonnum.

### Símun skoraði móti sínum egnu

Tá umleið tíggju minuttir vóru eftir at spæla legði AB seg framum. Ein langur bóltur varð sendur úr vinstra borði inn um verjuna hjá B71. Har var fyrrverandi B71-áleyparin, Símun Hansen, skjótur avstað, og hann lyfti bóltin upp um Valdemar Novicki til 1-0. Símun skifti í summarsteðginum frá júst B71 til AB.

Alt bendi á, at hetta fór at vera sigursmálið hjá útiliðnum, men B71 svaraði aftur í síðstu løtu.

Tórhallur Thomsen fekk bóltin miðskeiðis á AB-hálvuni. Hann setti kós móti málinum og langaði til úr 25-30 metra fjarstøðu. Skotið bar við ein AB-verjuleikara og snýtti málverjan, og so var støðan 1–1.

Sami Tórhallur hevði eina roynd eftir hetta, tá hann fekk høvdið á eitt innlegg, men málverjin bjargaði í stórum stíli.

Annars var dysturin sera javnur, og tað var helst á góðari leið, at tað endaði við javnleiki. Bæði liðini høvdu fleiri málmøguleikar, men tað gekk heldur striltið við at avslutta álopini.

Í komandi umfari tekur B71 ímóti oddaliðnum ÍF, og AB skal til Leirvíkar at spæla ímóti einum øðrum botnliði, nevniliga LÍF.

**B71-AB 1-1 (0-0):**
0-1: Símun Hansen
1-1: Tórhallur Thomsen



*AB er steðgað upp. Í seks teimum seinastu dystunum er tað ikki eydnast at fáa ein sigur. Síðsta mistu teir á stokkinum, tá B71 javnaði í evstu løtu*

*Savnsmynd*

TB – LÍF 6-0 (2-0)

# TB hevur sett ferð á

**Við trimum sigrum á rað hevur TB nú sett allar ketlarnar í gongd í royndini at fáa oddaliðið ÍF aftur**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*




*TB hevur ætlanir um at sleppa uppaftur í 1. deild at spæla ímóti EB/Streymi og øðrum 1. deildarliðum. Við trimum sigrum á rað er TB nú við aftur í oddastríðnum*

*Savnsmynd*

**TB-LÍF 6-0 (2-0)**
1-0: Kaj Roest
2-0: Rasmus Nolsøe
3-0: Allan Michelsen
4-0: Óli Johannesen (br.)
5-0: Kaj Roest
6-0: Allan Michelsen

Tað var ongantíð nakar ivi um, hvør fór at vinna dystin ímillum TB og LÍF á Sevmýri leygardagin. TB er sera væl koyrandi í løtuni, og teir lótu ongantíð nakran iva vera um sigurin.

Støðan var 2-0 við steðgin. Toppskjúttin hjá TB, Kaj Roest, legði heimaliðið framum, tá hann skallaði eitt hornaspark í netið. Síðani skoraði Rasmus Nolsøe, tá hann úr spískum skoraði til 2-0.

Eftir steðgin økti Allan Michelsen til 3-0, og síðani setti Óli Johannesen eitt brotsspark í netið. Kaj Roest fekk fimta málið, og Allan Michelsen skeyt seinasta málið, tá hann gjørdist leysur við málverjanum.

### TB hóttir ÍF

TB er nú størsta hóttanin móti ÍF, sum liggur á odda. Fýra stig eru millum hesi bæði liðini, men ÍF skal tann 13. september spæla ímóti TB á Sevmýri. Hesin dysturin fær óivað sera stóran týdning fyri, hvat lið endar í 1. deild komandi kappingarár.

TB hevur vunnið allar tríggjar dystirnar eftir summarsteðgin, og allir sigrarnir hava verið rættiliga sannførandi. Tí kann roknast við, at TB fer at leggja trýst á ÍF í seinnu hálvu av landskappingini.

Komandi vikuskiftið verður eitt rættiligt brak á Krossinum í Sumba. Tá møtast Sumba, sum er á triðja plássi, og TB, ið liggur á næstfremsta plássi. Lokaluppgerðin plagar at vera lívlig, og tað verður sikkurt eitt brak av dysti komandi leygardag.

Nú eru bert sjey umfør eftir í landskappingini. T.v.s. at tað eru 21 stig at spæla um. Uppflytingin verður óivað avgjørd millum ÍF, TB og Sumba.

| | | DYSTIR | VUNNI | | JAVNT | | TAPT | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MÁL MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 20 | 7 | 13 | 26 |
| 2 | TB | 11 | 7 | - | 1 | - | 3 | 31 | 16 | 15 | 22 |
| 3 | SUMBA | 11 | 6 | - | 3 | - | 2 | 23 | 9 | 14 | 21 |
| 4 | VB | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 25 | 13 | 12 | 19 |
| 5 | KÍ | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 25 | 31 | -6 | 19 |
| 6 | AB | 11 | 3 | - | 5 | - | 3 | 20 | 17 | 3 | 14 |
| 7 | B36 | 11 | 3 | - | 3 | - | 5 | 17 | 15 | 2 | 12 |
| 8 | LÍF | 11 | 3 | - | 1 | - | 7 | 14 | 32 | -18 | 10 |
| 9 | B71 | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 15 | 17 | -2 | 8 |
| 10 | B68 | 11 | 1 | - | 1 | - | 9 | 5 | 38 | -33 | 4 |